# Skerdir skálamenn til Havnar

**Skála má klára seg uttan fleiri av sínum lyklaleikarum í dystinum ímóti B36, sum hinvegin er hampuliga væl fyri til dystin, ið fer at avgera annaðplássið**



*Pauli Hansen hevur verið ein av monnunum aftanfyri væleydnaða kappingarárið hjá Skála, men hann hevur fingið ein knæskaða og verður ikki tøkur ímóti B36 í Gundadali*

*Savnsmynd*

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Venjarin hjá Skála, Johan Nielsen, má framvegis síggja burtur frá Paula Hansen, Arnhold Berg og Hanus Thorleifsson til dystin ímóti B36 sunnudagin, tá Skála skal royna at verja annaðplássið.

Pauli Hansen hevur havt eitt framúr gott kappingarár á miðvøllinum hjá Skála, og hann hevur eisini verið inni í landsliðshitanum. Hann er ein av lyklaspælarunum, sum ikki er tøkur ímóti B36. Hann fekk ein knæskaða í dystinum ímóti ÍF, og óvist er, nær hann verður klárur aftur.

Arnhold Berg hevur eisini havt eitt gott kappingarár í verjuni hjá Skála, men hann er eisini skaddur til komandi dyst. Hanus Thorleifsson er ein av teimum ungu og evnaríku skálamonnunum, sum hevur gjørt vart við seg, síðan Skála kom upp í 1. deild, men honum kann venjarin heldur ikki rokna við.

Venjarin Johan Nielsen ásannar, at Skála ikki hevur serliga breiðan hóp, og tí rakar tað serliga meint, tá ein leikari sum Pauli Hansen fellur frá. Skála hevur hinvegin einki leikbann.

**B36 væl fyri**

Frá seinasta dysti er bert ein leikari, sum ikki er tøkur hesuferð. Talan er um Niels Joensen, sum hevur verið rættiliga eyðsýndur á miðvøllinum hjá B36 í ár. Niels hevur leitað sær til Keypmannahavn í lestrarørindum, og hann verður tí ikki at síggja í hvíta búnanum komandi árini.

Arnbjørn Danielsen hevur verið skaddur síðan seinna UEFA-Cup dystin, og hann er framvegis skaddur. Jens Erik Rasmussen hevur ikki verið nógv at sæð á B36-liðnum í ár, og hann situr enn uttanfyri við skaða.

Hetta er ein rættiliga avgerandi dystur, ið stendur fyri framman. Skála er á øðrum plássi og B36 á triðja, tvey stig aftanfyri Skála. Heimaliðið er favorittur undan dystinum, men B36 hevur áður víst stórar veikleikar í Gundadali, og tí skal einki takast fyri givið.


## Verkfrøðingur ella teldufrøðingur



KT-fyritøkan Atlants Tøkni sóknast eftir fólki, ið helst av øllum hevur hægri verkfrøðiliga ella teldufrøðiliga útbúgving. Hevur tú hollar royndir í at menna forrit, eru vit áhugað í tær. Nom og nærløgd nýútbúgvin og onnur dugnalig fólk, ið eru tøkniliga væl fyri eftir drúgvar og ymiskar royndir á KT-økinum, eru sjálvandi eisini áhugaverd. Starvsfólkið á Atlants Tøkni er vælútbúgvið og hevur nógvar royndir. Vit kunnu bjóða tær eitt gott og mennandi fakligt umhvørvi.

Starvið er fjøltáttað. Undir øllum umstøðum sleppur tú at dusa tær í nýggjastu tøknini. Tú fert kanska at arbeiða á øllum økjum okkara og sostatt fremja einstakar ætlanir úr enda í annan. Men ert tú sjáldsama serkønur, kanst tú eisini leggja teg eftir at røkja serstakar partar av heildarætlanum.

Tú fært góða løn sambært avtalu.

Send okkum umsókn, prógv og annað áhugavert. Ella støkk inn á gólvið hjá okkum á Bryggjubakka í Havn.

*Atlants Tøkni varð stovnað á vári 2001 og er ein føroysk fyritøka, ið veitir skikkaða KT-tænastu. Í fyritøkuni starvast seks fólk. Vit hava serkunnleika í at menna og laga skipanir til í Microsoft og Oracle umhvørvi, hava dátuumsiting (DBA), arbeiða við Client/Server-loysnum, gera góðar web- og innanhýsis netgreiðslur og veita ráðgeving í hesum og øðrum sambandi. Vit hava viðskiftafólk bæði í Føroyum og uttanlands.*

***Atlants Tøkni*** *· Bryggjubakka 4*
*Postsmogu 277 · FO-110 Tórshavn*
*Tel 32 20 90 · Faks 32 20 92*
*Teldupostur: att@att.fo*
*www.att.fo*

REPROZ

**Atlants Tøkni**


## 1. deild menn

| | | d | v | - | j | - | t | v/ mál | t/ mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 13 | 10 | - | 2 | - | 1 | 35 | 12 | 23 | 32 |
| 2 | Skála | 13 | 8 | - | 2 | - | 3 | 28 | 16 | 12 | 26 |
| 3 | B36 | 13 | 7 | - | 3 | - | 3 | 24 | 15 | 9 | 24 |
| 4 | GÍ | 13 | 6 | - | 2 | - | 5 | 23 | 24 | -1 | 20 |
| 5 | VB | 13 | 5 | - | 4 | - | 4 | 18 | 15 | 3 | 19 |
| 6 | NSÍ | 13 | 5 | - | 3 | - | 5 | 22 | 18 | 4 | 18 |
| 7 | EB/Streymur | 13 | 5 | - | 2 | - | 6 | 22 | 20 | 2 | 17 |
| 8 | KÍ | 13 | 3 | - | 7 | - | 3 | 18 | 18 | 0 | 16 |
| 9 | ÍF | 13 | 2 | - | 1 | - | 10 | 19 | 43 | -24 | 7 |
| 10 | B68 | 13 | 0 | - | 2 | - | 11 | 10 | 38 | -28 | 2 |

## 2. deild menn

| | | d | v | - | j | - | t | mál | mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 12 | 9 | - | 0 | - | 3 | 34 | 15 | 19 | 27 |
| 2 | AB | 12 | 8 | - | 2 | - | 2 | 21 | 14 | 7 | 26 |
| 3 | B71 | 12 | 7 | - | 2 | - | 3 | 34 | 25 | 9 | 23 |
| 4 | FSV | 12 | 5 | - | 3 | - | 4 | 40 | 23 | 17 | 18 |
| 5 | Royn | 12 | 6 | - | 0 | - | 6 | 27 | 28 | -1 | 18 |
| 6 | Sumba | 12 | 5 | - | 3 | - | 4 | 19 | 21 | -2 | 18 |
| 7 | LÍF | 12 | 4 | - | 3 | - | 5 | 20 | 25 | -5 | 15 |
| 8 | B36 | 12 | 3 | - | 2 | - | 7 | 16 | 34 | -18 | 11 |
| 9 | KÍ | 12 | 2 | - | 3 | - | 7 | 21 | 27 | -6 | 9 |
| 10 | VB | 12 | 0 | - | 4 | - | 8 | 10 | 30 | -20 | 4 |

## Dystir um vikuskiftið

**1. deild menn**
29.08 B36-Skála
29.08 KÍ-NSÍ
29.08 B68-HB
29.08 ÍF-VB
29.08 EB/S-GÍ

**2. deild menn**
28.08 Sumba-TB
28.08 FSV-B36
28.08 LÍF-B71
28.08 AB-VB
28.08 Royn-KÍ

**3. deild menn**
29.08 Fram-Skála
29.08 ÍF-TB
29.08 SÍ-NSÍ
29.08 EB/S-GÍ
29.08 B68-HB


# Vikuskifti

Nr. 163 • leygardagur • 28. august 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo




Amerikanski dreymurin í Føroyum

Lesið síðu 2-3



# Eitt gásaævintýr

Í einum túni í Klaksvík gongur ein vakur og spelkin gásasteggi. Hann eitur Gutti og undir liðini á honum ganga unnustan Margretha og 1 ára gamli ungin hjá teimum báðum Tøppur. Lítla gásafamiljan er sera lukkulig, men soleiðis hevur tað ikki altíð verið, tí djóraverðin kann eisini vera køld og hjartaleys.

Tá Gutti var føddur, vildi mamman hvørki vita av honum ella hinum systkinunum. Hon tveitti øll eggini út úr gásareiðrinum, út á bøin til grammu likkurnar, sum glúpskar stoyttu seg niður eftir eggunum, skræddu tey sundur og ótu tey.

Beint við gekk ein maður og smíðaði sær eitt hús. Tá hann sá syrgiliga skilið, leyp hann í einum lopi oman á bøin, men tá lá bara eitt einsamalt egg eftir

– Hetta eggið skulu likkurnar ikki fáa - illanstíð, hugsaði maðurin og tók eggið varisliga upp og fór inn við tí. Har pakkaði hann eggið inn í eitt sindur av glasull og legði tað á heita gólvið inni í baðirúminum. Dagin eftir, tá maðurin aftur byrjaði at smíða, hoyrdi hann knappliga eitt løgið ljóð. Hann steðgaði, lurtaði og jú, nú hoyrdi hann tað aftur: "Pip, pip". Hann gekk kvikliga eftir ljóðinum og lúrdi inn í baðirúmið. Og hygga síggj! - eitt lítið hol var komið á eggið, og út úr holinum kagaði ein lítil gásaungi.

– Hesin skal eita Gutti, hugsaði maðurin og breyt varisliga restina av egginum burtur, so ungin slapp út. Gutti hoppaði úr egginum, eitt sindur í ørviti, tí hann visti jú slettis ikki, hvar hann var.

Men tíðin gekk, og Gutti vaks og treivst væl. Maðurin gjørdi Gutta eitt lítið hús og ein hyl uttanfyri, og Gutti var glaður. Men sum frá leið, stóð hann ofta bara og hugdi og sá so syrgin og einsamallur út. Helst mundi hann leingjast eftir eini konu, hugsaði maðurin.

Ein morgunin, tá maðurin kom út, sá hann, at Gutti hevði fingið vitjan. Ein stór og vøkur gásabøga stóð í túninum, og Gutti var púra burtur í henni. Hann helt, at hon líktist eini drottning, og tað var heldur ikki so løgi, tí hetta var Margretha, og hon var uppkallað eftir drottningini.
Gutti og Margretha vóru lukkulig, og skjótt byrjaðu tey at reiðrast. Øll í grannalagnum fylgdu spent við, meðan tey bæði dúgliga stákaðust út og inn í lítla gáshúsinum, og øll bíðaðu i tolni eftir at hoyra fyrstu pippini. Men onki hendi, tí hvørja ferð vóru øll eggini tóm. Og skjótt vóru tey bæði líka við at missa vónina um, at tey nakrantíð fóru at hoyra ljóðið av smáum fitjufótum fara titandi eftir bønum.

Men nú bar so á, at í eini aðrari bygd sat lítli Tøppur, ein einsamallur gásaungi, sum onga mammu átti, og fólk tóktust so sera synd í honum. Hetta hoyrdu tey heima hjá Gutta, og skjótt sat Tøppur umborð á Dúgvuni á veg til Klaksvíkar. Gutti og Margretha trúðu ikki sínum egnu eygum, tá tey sóðu Tøpp og gloymdu i stundini alt um øll tey tómu eggini, tí Tøppur var tann fittasti gásaungin, tey nakrantíð høvdu sæð. Og soleiðis gjørdust Gutti, Margretha og Tøppur tann eydnuríkasta gásafamiljan har um leiðir.

Og um ongin hevur órógvað tey, búgva tey trý har enn ...